

## Grækarismessuhald í Fuglafirði

Skótarnir í Fuglafirði skipa fyri grækarismessuhaldi á Bugnum í morgin, sunnudagin, kl 17. Frits Johannesen fer at flyta fram røðu, Fuglafjarðar Hornorkestur spælir, og skótarnir ganga skrúðgongu. Boðið verður til ein drekkamunn í skótahúsunum eftir haldið á Bugnum - og skótarnir møta í skótahúsinum ein hálvan tíma undan.

## Kanningarstjóri kanna løgmann

Løgtingsformaðurin hevur tilnevnt Páll Nielsen, advokat til kanningarstjóra sambært §38, stk. 2 í stýrisskipanarlógini at fáa greiðu á, um løgmaður framdi brot á § 5, stk. 2 í løgtingslóg um ábyrgd landsstýrismanna, tá hann tann 18. februar 1999 svaraði fyrispurningi frá Dan R. Petersen tingmanni viðvíkjandi leiguútreiðslunum hjá aðalstýrunum.

## Dynamitt 2000 á Strondum

Í kvøld verður stórt dansikvøld á Strondum, sum Strálan skipar fyri.

Tað er tann vælumtókti bólkurin Dynamitt 2000, ið spælir. Ætlanin var, at teir skuldu spæla á Kambsdali síðsta vikuskifti fyri jól, men vi9ð tað, at veðrið varðs o vánaligt, varð tiltakið avlýst. men nú verður so møguleiki at hoyra teir.

Bólkurin er settur saman við tónleikarum úr Dynamitt og Kjølum - ein bólkur, sum setir lív í alt dansifólkið.

Møguleiki verður eisini at keypa sær okkurt til matna.

## Norðmenn granska laksalúsina

Laksalúsin er ein stórur trupulleiki fyri alivinnuna. Alilaksurin trívist ikki væl um hann hevur lús og lúsin verður eisini mett at verða ein hóttan ímóti villum laksi. Síðani 1995 hava norðmenn miðvíst arbeitt við granskingarverkætlanum um hevda snúltarin og í dag er vitanin væl størri.

Granskingarverkætlaninar, sum í stóran mun eru fíggjaðar gjøgnum »Norges Forskningsråd«, eru gjørdar um lívfrøðina hjá lúsini, hvussu hon spjaðir seg og trupulleikarnir, ið alivinnan hevur av henni.

Áðrenn 1995 snúði granskingin serliga um menning av nýggjum evnum at drepa lúsini við. Seinnu árini hevur granskingin gjørt meira burturúr, á hvønn hátt arbeiðast skal í vinnuni, fyri at fyribyrgja spjaðing av laksalús. Í dag vita granskarar meira um, hvussu viðurskifti sum saltinnihald og hiti í sjógnum ávirka møguleikarnir hjá lúsini at yvirliva. Funnið er m.a. fram til, at nøgdin av laksalús økist, um hitin í sjógnum er hægri enn vanligt um heystið og veturin, og at samband er ímillum trupulleikan av lús á ávísum alistøðum og streym- og vindviðurskiftunum í aliøkinum.

Fyri at halda trupulleikanum niðri hava norðmenn gjørt eina nationala skipan, har regluliga verður fylgt við, hvussu nógv lús er á laksinum. Um talið á lúsum fer upp um ávíst mark verður avlúsað.

Eitt av úrslitunum av granskingarverkætlanunum seinnu árini er, at granskarar nú arbeiða við at menna eina vaksinu ímóti laksalús. (Forskningsnytt).

# Skattalógin til skattapolitisk endamál

*Um skattalógin verður nýtt til at loysa ymisk onnur endamál enn skattapolitisk, verður lógin skjótt so torskild, at hon ikki verður at skilja hjá skattaborgarum, og hartil verður hon munandi tyngri at umsita hjá skattafyrisitingini., svarar fíggjarmálaráðharrin Flemmingi Mikkelsen*

Ólavur í Beiti

Flemming Mikkelsen, løgtingsmaður Sambandsflokssins spurdi fíggjarmálaráðharran Karsten Hansen, um fíggjarmálaráðharrin hevur ætlanir um at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið um serskatting av hjúnum í hesi tingsetuni?

Í drúgva svarinum, sigur Karsten hansen, at landsstýrið hevur arbeitt við at gera skattalógina einfaldari seinastu árini. Nærum allir frádráttir eru avtiknir. Nakrir eru tó lagdir um til útgjaldsskipanir, t.d. rentustuðul í staðin fyri rentufrádrátt, ferðastuðul í staðin fyri ferðafrádrátt, telefonstuðul í staðin fyri telefonfrádrátt, stuðul til konu- og barnapening í staðin fyri frádrátt í inntøku. Annars eru bert fáir frádráttur eftir, t.d. frádráttur í inntøkuni fyri inngjøld til eftirlønarskipanir og frádráttur fyri meirútreiðslur vegna inntøkugevandi arbeiði í útlondum. Pensjónistfrádrátturin og barnafrádrátturin eru eftir sum vanligir frádráttir í skattinum.

– Henda umskipan gjørdi tað óneyðugt hjá 70% av skattaborgarunum at senda inn sjálvuppgávu. Fíggjarmálaráðharrin heldur tí, at ein eigur at vera varin við nú afttur at byrja at brúka skattalógina til onnur endamál enn at krevja skatt inn. Endamálið við automatiseringunum, sum eru gjørdar og koma at verða gjørdar, kunnu tá vísa seg at vera nyttuleysar.

### Skattaobjekt

– Um skattalóggávan verður broytt soleiðis, at inntøkan hjá hjúnafeløgunum verður løgd saman og síðani býtt í tvey, ella møguliga tann hjúnafelagin, sum onga inntøku hevur, kann flyta upp til kr. 140.000 frá hinum hjúnafelagnum til skattingar hjá sær sjálvum, áðrenn hon verður skattað, so er hetta eitt stórt stig á vegnum aftur



*Flemming Mikkelsen, løgtingsmaður Sambandsfloksins*

til gomlu skattaskipanina, har húskið var skattasubjekt.

– Í fyrsta lagi hevði ein tílík broyting ført til stóra ógreiðu um hugtakið skattskyldug inntøka, sigur Karsten Hansen. Í øðrum lagi hevði ein tílík broyting ført við sær krav um, at skattaskipanin bæði skuldi kunna skatta einstaklingar og hjún. Hetta hevði ført til eina dýrari skattaumsiting.

### 30 mió. kr.

– Um skattalógin verður broytt soleiðis, at inntøkan hjá hjúnafeløgunum verður løgd saman og býtt í tvey, áðrenn hon verður skattað, so minka landsskatta- og kommunuskattainntøkurnar við umleið 30 mió. kr.

– Henda upphædd hevði væntandi vaksið munandi tey næstu árini. Tað er tó sera ilt at meta um, hvussu nógv hjún høvdu valt at latið annan hjúnafelagan verið heima, og tískil er sera ilt at meta um, hvussu nógv skattainntøkurnar høvdu minkað tilsamans, sigur Karsten Hansen at enda í svarinum til Flemming Mikkelsen.

# Lønardeildin heldur siðvenjuna

*Lønardeildin heldur ta siðvenju, hon alla tíðina hevur havt, sigur Olavus Jespersen í viðmerking til grein um vaskikonurnar hjá Toll- og Skattstovuni, sum stóð í Sosialinum í hósdagin*

Edvard Joensen

Tað var ikki gjørligt at fáa viðmerkingar frá Lønardeildini til nevndu grein, áðrenn hósdagsblaðið fór til prentingar. Men eftir, at blaðið var prentað, ringdi Olavus Jespersen til okkara, so ein viðmerking kundi fáast frá Lønardeildini.

Olavus Jespersen sigur, at Lønardeildin hevði kannað, hvussu vanlig mannagongd var, tá vaskifólk varð sett í starv hjá Toll- og Skattstovuni.

Tey fingu greitt at vita, at goldin varð vanlig tímaløn umframt fimm krónur, tí arbeitt verður vanliga um kvøldið. Tá gjørt verður høvuðsreint, verða goldnar sjey krónur eyka um tíman, sigur Olavus Jespersen. Hetta er tað, Landsstýrið, og seinni Fíggjarmálastýrið, hevur góðkent og praktiserað, sigur Olavus Jespersen.

Hann sigur, at Lønardeildin kann ikki gjalda nakra eftirløn til vaskifólk á Toll- og Skattstovuni sambært sáttmála av teirri einfaldu orsøk, at eingin sáttmáli er millum Lønardeildina og Føroya Arbeiðarafelag um hesi fólkini.

# Minningarorð um Nanny Joensen

f. 3.9.1942 – d. 28.2.2000

Ikki vardi okkum, tá ið vit vóru saman úti hjá Solveig – og skemtaðu og hugnaðu okkum, at hetta fór at verða síðsta ferðin, vit sótu saman á henda hátt, tú skuldi bara til Havnar at fáa ordna hettar inngrebi, ið læknarnir høvdu sagt, var skjótt gjørt. Men hvat?

Tú setti okkum stevnu aftur tórskvøldið – ja vit vóru har tá, bert tveir tímar fyrr og ikki í somu ørindum, nei góða Nanny, tú vart í kistu, og nú standa vit her og spyrja: Hví – hví góða Nanny?

Tú varð so frísk og røsk, ja full av lívi, hví tú, sum hevði so nógv at geva okkum øllum, sum hildu av tær – hví Nanny? Her fáa vit ikki svar uppá okkara hví, men einaferð verður svara uppá hvørt hví.

Tú var altíð tann, sum tók tað tunga takið – kom og gerið tað og tað, nú standa vit og hugsa, hví tú hevði ein so stóran skund, altíð at hjálpa – tí tín tíð var avmarkað. Ja, nú hevur tú frið og hvíld eftir títt stríð.

Títt heim, maður, børn og ommubørn vóru títt prýði og tú oysti teimum av tínum kærleika. Nú er tómt í Tippinum. Takk fyri alt tú gav okkum øllum. Harrin styrki teg Poul Johannes, Páll, Torbjørn, Jan, Birgir, Sóley og Heidi við makum og børnum. Orð kunnu ikki siga hvat ið rørist í okkum.

Æra verið minni um teg góða Nanny, hvíl í friði.

**Seinasta heilsan frá vinkonunum**







# Stórur áhugi fyri Rás 2

*Klaksvíkingar eru hugaðir at samstarva við Rás2, men næsta vikan fer at vísa, hvat ítøkiligt spyrst burtur úr*

Eyðun Klakstein

Útsendu menninir hjá Rás 2 lata væl at fundunum, teir høvdu í Klaksvík hósdagin.

Umboð fyri Rás 2 vóru í Klaksvík fyri at tosa við lokal fólk um samstarv og at lodda dýpið millum norðoyingar.

Og hesin góðveðursdagurin eydnaðist eftir øllum at døma væl.

- Áhugin er stórur fyri Rás 2 millum klaksvíkingar, og vit høvdu eisini nakrar fínar fundir, sigur Petur Jacobsen, sum er stjóri á Rás 2.

Rás 2 fundaðist við Norðoya Sparikassa, sum hevur keypt sendaran, sum skal setast upp á Brúnaskarði í næstu viku.

Hesin fundur snúði seg ikki um redaktionel viðurskifti, tí Norðoya Sparikassi hevur boðað frá, at teir als ikki fara at leggja seg út í , hvat Rás 2 sendir. Teirra uppgáva hevur útilokandi verið at skaffa umstøður fyri, at Rás 2 kann senda til Klaksvíkar.

### Rás 2 áhugað í Pegasus

Hinvegin varð tosað um meira praktiskt samstarv, tá Rás 2 fólkini vóru á fundi við Studio Pegasus og lokalblaðið Norðlýsið.

Studio Pegasus, sum skjótt hevur tvey ár á baki, hevur góðar umstøður at virka undir, og tí er Rás 2 rættiliga áhugað í samstarvi við studioið í Klaksvík.

Men Petur Jacobsen kann ikki siga okkum frá nakrar endaligari avgerð, tí ein slík er ikki tikin enn.

- Næsta vikan kemur at vísa, hvat ítøkiligt spyrst burtur úr fundinum við Studio Pegasus, sigur stjórin á Rás 2.

Í løtuni verður einasta sendingin, sum Útvarp Føroya framleiðir uttan fyri høvuðsstaðin, gjørd í Studio Pegasus, og Steintór Rasmussen, sum rekur Studio Pegasus, hevur í Sosialinum áður nevnt møguleikan fyri øktum samstarvi við Útvarp Føroya.

Men í løtuni er tað Rás 2, sum ger tað uppsøkjandi arbeiði í Klaksvík, og tí fer eitthvørt kanska at spyrjast burtur úr innan ov leingi.

### Norðlýsið kanska við

Einasta lokalblað í Føroyum heldur til í Klaksvík, og Oliver Joensen, blaðstjóri á Norðlýsinum, er eftir øllum at døma sinnaður at samstarva við Rás 2, tá teir fara at senda til og úr Klaksvík.

Norðlýsið, sum kemur út eina ferð um vikuna, hevur sína redaktión nærindis Studio Pegasus. Hvussu samstarvið millum Rás 2 og Norðlýsið fer at vera, er eingin avgerð tikin um enn.

- Okkara fyrsta mál er at senda til Klaksvíkar, og tað fer at lata seg gera innan stutta tíð, kanska í næstu viku. Síðani er ætlanin at fara at senda úr Klaksvík, sigur Petur Jacobsen, stjóri á Rás 2.

Hann sigur, at tosað hevur verið um møguleikan at senda lokalt tilfar úr Klaksvík og bara til klaksvíkingar, og hóast hetta er tekniskt gjørligt, ivast stjóri á Rás 2 í, um tað formella sendiloyvið, sum Rás 2 hevur, loyvir hesum.

- Tað er mest upplagt, at vit fara at gera ávísar sendingar og at senda ávís tíðarskeið úr Klaksvík, sigur Petur Jacobsen.

Sendarin á Brúnaskarði fer at senda á 107,0 MHz, tá hann verður tendraður. Um alt gongur væl, bæði tekniskt og við veðrinum, verður møguliga sent til Klaksvíkar og størri part av Eysturoynni í næstu viku.

# Danir atkvøða um evruna

*Tað hevur fingið blandaða móttøku í Danmark, at veljararnir aftur skulu til fólkaatkvøðu um ein ES spurning*

Sveinur Tróndarson

Gongur alt, sum Poul Nyrup Rasmussen ætlar, so verður fólkaatkvøða um evruna, sum danskt gjaldoyra, tann 28. september.

Hesum boðar forsætisráðharrin frá í tíðindaskrivi fyrradagin.

Poul Nyrup Rasmussen leggur í skrivinum dent á, at stjórnin avgjørt er fyri at fara upp í evropeiska pengasamstarvið, men at stjórnin eisini hevur lagt dent á at hetta ikki er gjørt, fyrr enn danir sjálvir hava viðgjørt málið gjølla.

Hann vísir eisini á, at danir gjørt eitt gott arbeiði fyri ein positivan økonomiskan politikk við lágari inflatión, sunnum búskapi og ikki ov høgum arbeiðsloysi.

Eisini greiðir Poul Nyrup frá, at Socialdemokratiski flokkurin fer at hava eyka landsfund júst um evruna í apríl mánað, og at tað har verður endaliga avgjørt, at fólkaatkvøðan í Danmark verður tann 28. september í ár.

### Blandaða móttøku

Uppskotið um eina skjóta fólkaatkvøðu um evruna hevur fingið blandaða móttøku í Danmark.

Flokkarnir høgru megin miðjuna, Vinstri og Konservativu eru stak fegnir um, at fólkaatkvøðan verður so skjótt sum yvirhøvur tilber, meðan SF, Eindarlistin og Junirørslan, sum bara er umboðað í Evropaparlamentinum, eru misnøgd við avgerðina.

Vinstri og teir Konservativu siga, at tað hevur avgjørdan týdning fyri danskan búskap at gerast partur av evrusamstarvinum og at hetta ongantíð verður gjørt ov skjótt.

Konservativi Bendt Bendtsen heldur, at eitt hálvt ár er nóg mikið til eitt gjølligt kjak, men hann fær ikki viðhald frá øllum.

SF, Eindarlistin og Junirørslan halda, at tað er at spæla høgt spæl við veljarunum, at kroysta eina fólkaatkvøðu niður yvir teir nú, men teir taka stríðið sum tað kemur.

Jens Peter Bonde, úr Junirørsluni, er í øðini um at fólkaatkvøðan verður í september. Hann sigur, at tað er óseriøst tí tað ber ikki til at fáa eitt fullbúgvið kjak um eitt so álvarsligt mál upp á bara seks mánaðir. Valgranskarin Ole Tonsgaard er samdur við tí, sum Jens Peter Bonde sigur. Hann heldur, at Nyrup í øllum førum átti at bíða eftir kanningini, sum fýra óheftir búskaparfrøðingar gera av BMS (ØMU) - skipanini.

Eygleiðarar í Danmark siga, at danski forsætisráðharri við fólkaatkvøðuni tryggjar sær politiskan frið í eina tíð. Hetta málið fer at taka so nógva tíð og fer at krevja gott tvørpolitiskt samstarv, at hann fær arbeiðsfrið.

Samstundis tryggjar hann sær, at evrufólkaatkvøðan ikki fellur saman við stjórnarfuldin hjá ES, sum verður í desember mánað.

### Føroyingar atkvøða ikki

Í sambandi við fólkaatkvøðuna hevur Kristian Thulesen Dahl, úr Danska Fólkaflokkinum sagt, at føroyingar og grønlendingar eisini eiga at vera spurdir við fólkaatkvøðuna.

Hann ger í blaðsamrøðu greitt, at føroyingar og grønlendingar við einum donskum ja, verða tvungnir til at brúka evruna, sum gjaldoyra og tí eiga teir eisini at vera spurdir.

– Men tað verður av ongum, sigur Høgni Hoydal. Føroyingar skulu ikki atkvøða um evruna, tí vit eru ikki limir í ES: Vit hava eitt nú í uppritinum staðfest, at vit skulu knýta okkara pengaskipan at tí donsku, tí hon er støðug og fara danir upp í evrusamstarvið, so eiga vit at leggja okkum upp at tí. Men vit fara ikki upp í og tí skulu vit heldur ikki atkvøða um málið.


Júst afturkomin av seminar

**Nýggir viðgerðarhættir innan:**

- Andlitsrøkt
- Húð- og kropsrøkt
- Fótarøkt
- Viðgerð móti arrum og rukkum
- Massagu v/aromaterapi
- Kosmetikki

**Nógv góð tilboð av kosmetikki**



DERMAJETICS®
Natural Herbs. Natural Beauty.

**Húðrøkt v/ Jørnu**

660 Søldarfjørður • Tel. 44 11 86

Sosialurin - 311820